# ernir av sínum telvarum



tey inni hjá Onnu og Andrias Ziska. Ebba minnist, at verpápin hevði altíð talvborð standandi frammi, so talvrøturnar ganga langt aftur í tíðina.

Ebba og Marius fingu átta børn. Fýra dreingir, Andrias, Suni, Álvur og Bjarki og fýra gentur, Sólfríð, Anna, Poula og Marjun. Genturnar búgva allar niðri. Tríggir av dreingjunum Andrias, Suni og Bjarki komu at gerast av okkara fremstu telvarum.

### Ebba hjúklaði um telvararnar

Ebba eigur ikki minsta heiðurin fyri at hava hjúkla um talvevnini hjá sínum synum. Har komu teirra javnaldrar tíðliga og seint. Her telvaðu teir nærum í hvørjum skoti, og Ebba tók altíð væl ímóti teimum, blíð sum hon er.

Teir tríggir Ziska-brøðurnir hava fingið ein munandi leiklut í talvsøguni hjá Suna Merkisstein, sum kom út í 1997, og her skal ber vera trivið í okkurt hissini.

Í hesi bók sæst, at beiggjarnir hava verið við í telving síðan 1973, tá Suni eisini gjørdist føroyameistari. Sagt verður, at hann tók øll á bóli, tá hann trygt og sannførandi telvaði seg til sigurs, og sum 20 ára gamal gjørdist hann yngsti føroyameistari, sum hevði verið tá. Suni vann aftur ruddiliga í 1980. Hann lærdi seg mannagondina longu sum seks ára gamal, og hann telvar enn. Dyggur stuðul hevur hann eisini verið hjá Havnar Talvfelag, tí her er hann gjørdur heiðurslimur.

Í 1983 gjørdist Andrias føroyameistari. Hetta var óvæntað, tí hann hevði lægsta styrkital av luttakarunum, meðan Suni hevði tað hægsta. Men hetta forðaði ikki Andrias í at vinna. Ta ferðina skrivaði Andrias nakrar hugleiðingar um telvingina í ættini, sum hann minnist hana. Fyrst um tá ið Anthon á Krákusteini plagdi at vitja abban Andrias Ziska, og teir stongdu seg inni og vildu ikki órógvast. Tá telvaðu teir. Síðani greiðir Andrias frá, hvussu hann sjálvur kom at kappast við Suna í køkskrókinum heima í Bøkjarabrekku.

Bjarki byrjaði eisini blaðungur. Longu í 1974 - sum 17 ára gamal - var hann við á føroyska landsliðnum á olympiaduni í suðurfranska býnum Nice, og gjørdist úrslitið hjá Bjarka um miðal hjá føroysku luttakarunum, og var hetta gott klárað. Í 1978 var Bjarki við á eini talvferð til Íslands. Sagt verður, at Bjarki kom væl frá uppgávuni á fyrsta borðið. Fyri sjálva kappingina stóð mest sum á jøvnum millum Føroyar og Ísland. Bjarki hevur ikki verið almennur føroyameistari, men hann hevur vunnið nógvar aðrar kappingar sum t.d. í snartalvi.

Bjarki og Suni eru prentarar og høvdu - sum nevnt - í nógv ár prentsmiðju í kjallaranum hjá mammuni. Her gjørdu teir eisini eina roynd at geva út eitt talvblað. Tað kom út nakrar ferðir. Men teir ásannaðu eisini, at tað er ikki bert sum at siga tað at geva blað út í Føroyum, so hendan royndin var ikki drúgv. Men teir vístu í hvussu er sín áhuga.

### Hin omman keypti Helga fyrstu talvbókina

Sigast kann, at Helgi hevur gott til at at bregða við einum slíkum ættarbandi. Tað er ikki løgið, um øll ættin er errin av hesum 18 ára gamla knassanum.



*Ebba, mamma Andrias, hevur hjúklað væl um sínar telvarar*



*Suni var í síni tíð yngsti føroyameistarin í talvi*



*Á eini av sínum ferðum hevði Bjarki hesa tekning av sær sjálvum heim við sær*



*Helgi saman við gentuni Jóhonnu. SMS frá henni seinkaði hansara IM-normi*

Hetta er sjálvsagt eisini galdandi fyri ættina hjá Piu, mammu Helga, og foreldur hennara Sigrid og Jens.

Sigrid eigur eisini sín part í hesi talvsøgu. Hon keypti nevniliga Helga hansara fyrstu føroysku talvbøkur, tá ið Helgi var smádrongur. Her var grundarlagið lagt.

Jens og Sigrid er havnarfólk, so tað forslær. Jens er sonur Hansinu og Johan Dam, sum búðu í Konradsbrekku. Jens arbeiddi nógv ár sum kassameistari á gjaldstovuni.

Sigrid er dóttir Helgu og Jens Petur Rubeksen, vanliga kallaður Pedda post, sum var næstfyrsta postboð í Havn. Tey búgva á trøðni, sum Jens fekk eftir pápa sín. Tey hava á einum øðrum øki víst eitt serligt hegni. Her er so sera hugnaligt við eini fittari tjørn frammanfyri dyrnar. Í tjørnuni eru bæði dunnur og gæs.

### Slík talentir mugu stuðlast

Um Helgi eftir lokna skúlagongd í Hoydølum ger av at telva burturav í eitt tíðarskeið, ræður um at stuðla honum. Telving hansara á olympiaduni í Dresden hevur víst, at møguleikar eru til staðar at náa stórum úrslitum. Helgi eigur at fáa møgleika fyri at royna, hvussu langt hann kann koma innan telving.

Tað er tað sama galdandi fyri slík talvtalent, sum sagt varð um svimjaran Pál Joensen. Bert **ein** slíkur kann gera meira fyri okkara altjóða umdømi enn fleiri sendistovur. Og so er tað eisini so nógv bíligari.

Vit ynskja heimkomnu telvarunum hjartaliga tillukku við avrikinum í Dresden!